# FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-097_3_2
dags. 21-02-2011

**Innlendimálaráðið**
**Att: Annika Olsen, landsstýriskvinna**

imr imr.fo

***Viðv.: Skrivi dagfest 1. februar 2011til kommunufeløgini at taka støðu til.***
Felagið hevur móttikið skrivi tygara 01-02-2011 og er hettar viðgjørt á stýrisfundi 08-02-2011.

Í skrivinum verður heitt á felagið, at viðgera spurningin um fólksliga tilgongd í samband við ætlaðu kommunalu umskipanina.

Føroya Kommunufelag tekur til eftirtektar, at landið, sum myndugleiki yvir kommununum, boðar frá, at støði undir framtíðar kommunala bygnaðin verður 9 kommunal samstarvsøkir, samstundis sum eldraøkið verður lagt kommununum at umsita í 2013.

Felagið tekur til eftirtektar, at eldraøkið verður lagt út á einstøku økini, har álagt verður kommunum, stórum og smáum, at samstarva. Avgerðarrætturin í mun til umstingina av eldraøkinum verður tengdur at fólkatalinum í einstøku samstarvandi kommununum.

Felagið er ikki ímóti fólkaatkvøðum um samanlegging í kommununum. Kommunan er til fyri borgaran, og tí er tað eisini hesin, ið eigur at spyrjast um eitt so umráðandi mál sum samanlegging.

Spurningurin er bara, hvat borgarin verður spurdur um, tá fólkaatkvøðan verður?

Útspælið frá landinum sigur onki um, <u>hvussu eldraøkið skal skipast</u>, tá hettar verður lagt út til kommunurnar. Ongin eldralóg er í dag, og verður eldraøkið stýrt út frá eini leysari heimild í forsorgarlógini. Tískil eigur ein eldralóg at verða gjørd. Krøvini kommunurnar skulu liva upp til, tá økið verður lagt út til kommunurnar, eiga at verða kend, áðrenn fólkaatkvøður verða hildnar. Borgarin eigur at vita, hvat hann tekur støðu til, so hendan umráðandi avgerðin fyri kommununa ikki verður tikin í blindum.

Tá tað kemur til <u>fígging av uppgávunum</u>, sum verða lagdar kommununum at umsita, er heldur onki útspæl komið enn. Skal hettar skipast sum útjavning ímillum kommunur, broytt lutfall ímillum lands- og kommunuskatt ella sum blokkur frá landinum?

Felagið metir tað vera umráðandi, at hettar er væl lýst, fyri kommunum og borgarum, og at semja er um hettar týðandi mál, ímillum land og kommunur, áðrenn møguligar fólkaatkvøður verða hildnar.

Felagið tekur fult undir við at landsstýriskvinnan fer út í økini at kunna um ætlanina, tá hendan er fingin uppá pláss.

fyri felagið

Asbjørn Djurhuus, formaður                    Bergmann Finnsson, ráðgevi.